Vestmanna 11 mars 2023

Hoyringsskriv um broyting í veiðugjaldslógini

Ætlaði stutt at viðgerða ásetan av veiðugjøldum fyri bólk 2 í heimaflotanum.

Sambært lógaruppskotinum verður undantakið fyri bólk 2 í heimaflotanum strika.

Í Almennar viðmerkingar Kapittul 1.2. "Undantakið fyri heimaflota verður strika" verður víst til arbeiðsbólk frá vinnu og fyrisiting. Sambært bólkinum eigur meginreglan at vera: sama fiskaslag sama gjald. Útsøgnin, sama fiskaslag sama gjald, byggir væl á "undur somu fortreytum". Uppsjóarflotin avroknar manning við < 30% av nettosølu, meðan bólkur 2 avroknar manning við > 40%, so fortreytirnar eru ikki tær somu. Komandi gjaldið kann tí sigast vera ein skattur í mun til núverandi støðu. Umtalaði bólkur frá vinnu og fyrisiting er ongantíð komin við tilmæli um at leggja veiðugjøld á heimaflotan.

Eisini verður nevnt í viðmerkingunum at søla frá heimaflota til uppsjóarskip ítøkiliggerð størri tilfeingisrentu

Tað vit kenna, er at uppsjóarskipið fiskar kvotuna fyri skipið í heimaflotanum, og tá veiðan er landa, fær uppsjóarskipið 40% av avreiðingarvirðinum, og kvotueigarin í bolki 2 fær 60% sum manningin so verður avrokna eftur. Eisini verður brúkt at avgreiða alt við einum mettum avreiðingarprísið, áðrenn kvotan er fiska. Hettar broytur neyvan tilfeingisrentuna stórt.

Í Kapittul 1.2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið verður sagt, at skipanin viðvirkar til yvurkapasitet og at stovnsrøktin ikki virkar nóg væl, um tað er rætt so er tað er sjálvgjørt og ráð eru fyri tí.

Vit skjóta upp, at undantakið fyri veiðugjald heldur fram fyri tey skip í heimaflotanum sum fiska sína kvotu sjálvi.

Tað eru orsøkir til hettar uppskotið:

Tann mest eyðsýnda orsøkin er, tey skipini sum fiska sína makrel/sildakvotu sjálvi, fiska ikki í tveimum støðum samstundis, botnfisk og makrel/sild (skipið í bólki 2 fiskar botnfisk samstundis sum uppsjóarskip fiskar tess makrel/sildakvotu).

Tá heimaflotin fiskar makrel/sild sjálvur, troytur hann ikki grunnarnar eftur botnfiski.

Skipini í heimaflotanum eru smærri enn uppsjóarskipini, tískil eru nøgdirnar tey koma við minni, og tí lættari atkomuligar hjá smærri virkjum á landi, tað kann verða viðvirkandi til arbeiðspláss.

Um ein sær hettar sum eitt uppskot, íð einans hevur til endamáls at hjálpa teimum fáu skipinum sum hava fiskað sína makrel/sildakvotu sjálvi seinastu árini, so er tað ikki so áhugavert.

Harafturímóti um ein sær uppskotið sum eggjan til heimaflotan at fiska sjálvur, við teimum góðu árinum tað hevur, so eigur undantak fyri veiðugjald at verða givi teimum skipum í heimaflotanum sum fiska sjálvi.

Vinarliga

Vegna P/F Vesturbúgvin

Dánjal í Skálum

